# Arbeiðstíðaravtala
# millum
# Felag Tænastumanna Landsins
# og
# Fíggjarmálaráðið
# 2017

Avtalan er um viðurskifti hjá tænastumonnum og starvsfólki við tænastumannalíknandi setan við ásettari arbeiðstíð, har arbeiðið regluliga liggur uttan fyri vanliga arbeiðstíð, t.e. tollarar og vaktgangandi á MRCC-støðini.

**§ 1. Arbeiðstíðin**
Arbeiðstíðin er 39,5 tímar um vikuna.
Tímaløn verður roknað sum mánaðarløn faldað við 12 býtt við 2080.

**§ 2. Matarsteðgur**
Starvsfólk, sum arbeiða 6 tímar ella meira um dagin, hava rætt til matarsteðg ½ tíma tann dagin.
*Stk. 2.* Matarsteðgurin verður lagdur í samráð við starvsfólkið, soleiðis at endamálið við matarsteðginum verður rokkið.

**§ 3. At leggja arbeiðið til rættis**
Gerast skal vaktarlisti, sum fevnir um eitt ávíst tíðarskeið, við áseting um, nær arbeiðið skal gerast, nær frídagarnir liggja, og um og nær starvsfólkið hevur tilkallivakt. Vaktarlistin verður gjørdur í samráð við starvsfólkini. Arbeiðstíðin í miðal uppgjørd yvir eitt tílíkt tíðarskeið skal vera 39,5 tímar um vikuna. Starvsfólk eiga 8 vikur fram at vita, nær tey skulu arbeiða, og nær tey hava frí. Hetta er tó ikki galdandi fyri avloysarar og tímalønt.
*Stk. 2.* Broytingar í vaktarlistanum mugu ikki fara fram uttan undir heilt serligum umstøðum. Verður neyðugt at broyta vanligu arbeiðstíðina (tímalønt undantikin) í mun til ta upprunaligu, skal fráboðast við minst 72 tíma freist. Verður henda freist ikki hildin, fær starvsfólkið samsýning fyri 1 tíma eyka. Broytt arbeiðstíð er at skilja sum tíð, ið fellur uttan fyri ásettu arbeiðstíðina, men er ikki at rokna sum yvirtíð.
*Stk. 3.* Fyri arbeiði, sum fer út um fastlagda vakt og fyri arbeiði í teimum í § 8 ásettu føstu frídøgum, verður latin yvirtíðarløn eftir § 5.
*Stk. 4.* Fellur ein av føstu frídøgunum eftir § 8 á ein dag, sum eftir vaktarlistanum er frídagur, verður annar frídagur latin í staðin.

**§ 4. Arbeiði í ólagaligum tíðarskeiðum**
Fyri arbeiði í kvøld- og náttarvakt, t.e. millum 17.00 og 07.00 verður latið vaktargjald 1 eyka um tíman.
Fyri arbeiði í vikuskifti, frá fríggjadegi kl. 16 til mánamorgun kl. 8, og á føstum frídøgum, frá kl. 0.00 til kl. 24, verður lati vaktargjald 2 eyka um tíman.
Hesi gjøld verða roknað fyri byrjaðar hálvar tímar.

**§ 5. Yvirarbeiði**
Álagt arbeiði út yvir dagliga, planlagda arbeiðið hjá fulltíðarsettum verður roknað sum yvirarbeiði.
*Stk. 2.* Arbeiðstíð, sum í 8-viku-skeiðnum fer út um 316 tímar, er yvirtíð. Tó kunnu starvsfólk og leiðsla avtala, at arbeitt verður longri einum skeiði fyri at fáa eyka frí í einum seinni skeiði. Tá verður roknað tíma fyri tíma.
*Stk. 3.* Sagt eigur at verða frá fastløgdum yvirarbeiði dagin fyri.
*Stk. 4.* Yvirarbeiði verður gjørt upp í byrjaðum hálvum tímum hvønn dagin.
*Stk. 5.* Yvirarbeiði, sum er ikki í framhaldi av dagvaktini, verður tó altíð roknað sum minst 2 tímar.
*Stk. 6.* Yvirarbeiði verður samsýnt við vanligari tímaløn +50%, umframt frítíðarløn 12%.

**§ 6. Meirarbeiði**
Meirarbeiði hjá parttíðarsettum er arbeiði, sum liggur út yvir miðalvikutímatalið hjá viðkomandi, men innan fyri miðalvikutímatalið hjá fulltíðarsettum, og sum er ikki at meta sum yvirarbeiði smb. § 5.
*Stk.2.* Parttíðarsett skulu hava boð um meirarbeiði í arbeiðstíðini, seinast dagin fyri, og í seinasta lagi 12 tímar frammanundan. Fyri vantandi boð verður at rokna 1 meirarbeiðstíma eyka.
*Stk. 3.* Meirarbeiði verður lønt við tímaløn. Verður uppgjørt byrjaðar hálvar tímar.

**§ 7. Tilkallivakt**
Fyri tilkallivakt verður latið vaktargjald 1 um tíman. Fyri tilkallivakt leygardag og sunnudag, frá kl. 00 til kl. 24, verður latið vaktargjald 2 um tíman.
*Stk. 2.* Fyri tilkallivakt á teimum í § 8 ásettu frídøgum, sum eru ikki sunnudagar, verður latið dupult vaktargjald 2 um tíman, frá kl. 00 til kl. 24.
*Stk. 3.* Fyri arbeiði undir tilkallivakt verður veitt yvirtíðargjald, minst 2 tímar.
*Stk. 4.* Vaktargjald og yvirtíðargjald kunnu ikki latast fyri somu tímar.
*Stk. 5.* Tá ið tilkallivakt er av slíkum slag, at tað er rímiligt at víkja frá omanfyristandandi, eitt nú lítið tyngjandi tilkallivaktir, verður samsyning avtalað serstakt millum avtalupartarnar.
*Stk. 6.* Í tilkallivakt heimanífrá verður heimið at rokna sum arbeiðsstað.
*Stk. 7.* Tá arbeiðsgevari biður fólk, sum sambært vaktarætlan hava frí, taka eina eyka tilkallivakt, og har minni enn 24 tímar eru til vaktin byrjar, verður dupult vaktargjald latið. Vaktargjaldið kann tó ongantíð vera hægri enn dupult vaktargjald 1 ella 2.
Í skipanini av tilkallivaktunum verður miðjað ímóti, at vaktinar yvir árið vera javnt býttar millum starvsfólkini, sum luttaka í skipanini.

**§ 8. Fastir frídagar**
Jólaaftan, nýggjársaftan, páskaaftan, hvítusunnuaftan, flaggdagur, ólavsøkudagur og allir halgidagar eru heilir frídagar. Grundlógardagur og ólavsøkuaftan eru hálvir frídagar, t.e. eftir kl. 12.
*Stk. 2.* Arbeiðstíð á føstum frídegi verður roknað sum yvirtíðararbeiði.

**§ 9. Skeið**
Fyri skeið, sum leiðslan áleggur starvsfólkunum at luttaka á, verður hvør einstakur skeiðdagur roknaður sum 1 vanligur arbeiðsdagur, tó í mesta lagi 7,9 tímar. Um skeið liggur á degi, har starvsfólkið longu hevur arbeitt tímanormin, verður skeiðtíðin tald við í skyldugu arbeiðstíðina, tó við hægst 4 eykatímum útyvir dagtímanormin. Um skeið liggur í vikuskifti ella á føstum frídegi

eftir § 8, verður latin tímasamsýning fyri ólagaligu tíðina, samb. 4. Skeiðtíðin verður harumframt tald við í skyldugu arbeiðstíðina, tó við í mesta lagi 7,9 tímum hvønn skeiðdagin.
*Stk. 2.* Fyri skeið, sum liggja uttan fyri vanligu arbeiðstíðina, og sum eru ikki áløgd, kann stovnurin lata aðra frítíð tíma fyri tíma í staðin fyri tíðina, ið er nýtt til skeiðluttøku.
*Stk. 3.* Ferðing til skeið, sum liggja aðrastaðni enn vanliga arbeiðsstaðið (uttanbíggja og í útlondum), verður roknað í skeiðstíðina.
*Stk. 4.* Ásetingarnar í stk. 1-3 kunnu við avtalu millum starvsfólk og stovnin frávíkjast, men ger tílík avtala, at stovnurin verður stillaður verri arbeiðsliga ella kostnaðarliga, skal Fíggjarmálaráðið góðkenna hana.

**§ 10.** Henda avtala kemur í staðin fyri avtaluna frá 5. mai í 2011.

*Tórshavn tann 20. august í 2018.*

*Felag Tænastumenna Landsins*

*Fíggjarmálaráðið*

Meinhard Gaardlykke,
Formaður

Kristina Háfoss,
Landsstýriskvinna

Jan Mortensen,
Lønarstjóri